# Henrik Pedersen føroyameistari í billard

**Eftir ein steðg í fýra ár er hann aftur at síggja við borðið. Henrik Petersen, sum áður hevur vunnið seks FM heiti fyri staklingar, gjørdist nýggjur Føroyameistari í billard í Kagganum leygardagin. Hann vann í finaluni á Krisjan Suna Høgnesen**

TÍÐINDASKRIV
*Billardsamband Føroya*

Hann kom, sá og sigraði. Tað kann við røttum sigast um nýggja føroyameistaran í billard, Henrik Pedersen, sum seinasta vikuskiftið aftur vísti, at hann er okkara frægasti billardspælari.

Hóast mótstøðan varð hørð til tíðir, og hóast Henrik eisini tapti ein av innleiðandi dystunum, so megnaði hann kortini, sum so oftani áður, at taka tað longra stráið. Hann vann suverent í finaluni á tí tá verandi føroyameistaranum, Krisjan Suna Høgnesen.

Atlantic Airways Cup 2004, hvørs heiti føroyameistarakappingin bar í ár og helst komandi árini við, varð fyriskipað av Billardsambandi Føroya. Hon varð hildin í Kagganum, men innleiðandi umfarið varð eisini spælt í tí sera hugnaliga billardumhvørvinum í Havnar Klubba.

8 mans vóru við í finaluumfarinum: Henrik Pedersen, Krisjan Sune Høgnesen, Ólavur Kjølbro, Bjarni Skaalum, Anfinnur Hjalmarson, Johannes Skaarup, Niels Nielsen og Carsten Hansen. Kappingin um at koma í hálvfinalurnar var spennandi, og tað var eina løtu um reppið, at táverandi føroyameistarin Krisjan Sune Høgnesen kom við. Hann fekk eitt nú harða mótstøðu frá Carsten Hansen og eitt skifti eisini frá Anfinni Hjalmarson.

Men tað vórðu so teir fýra: Henrik, Ólavur, Bjarni og Krisjan Sune, sum komu víðari til hálvfinalurnar, og tað var eisini mest rættvísa úrslitið. Í innleiðandi umfarinum vóru annars fleiri sera stórir dystir. Henrik, sum ikki hevur verið við í FM-kappingini seinastu fýra árini, vísti seg ikki at hava gloymt billardfinessurnar, tá hann legði út við einum dysti uppá fleiri enn 1000 eygu, nakað, sum er nærum óhoyrt í føroyskum billard. Men eftir tað vísti ungi klaksvíkingurin Ólavur Kjølbro, at hann so avgjørt hoyrir til elituna í billard, tá hann skoraði fleiri enn 800 eygu.

Í hálvfinaluni millum Bjarna og Henrik vann Henrik, og hina hálvfinaluna vann Krisjan Sune á Ólavi. Stóri dysturin var sjálvandi finalan millum Henrik og Krisjan Suna. Henrik, sum ikki hevur verið við í billardkappingunum í fleiri ár, hevur áður megnað at vinna ikki færri enn 6 FM heiti. Krisjan Sune, sum vardi heitið, hevur vunnið tað seinastu tvey árini.

Finaludysturin gekk sera javnt á. Í hálvleikinum vóru bert 30 eygu á muni. Men tað skuldi vísa seg sum so mangan áður, at Henrik hevur størsta talentið og eisini bestu psykuna til avgerandi dystir í billard. Sum leið móti endanum av dystinum gjørdist munurin millum teir báðar størri og størri og endaliga úrslitið varð, at Henrik vann við 698 eygum móti 498. Nervarnir spældu inn hjá báðum, so dysturin var ikki millum teir størstu. Báðir hava teir fingið nógv fleiri eygu í FM-kappingunum í ár fyri lið.

Í dystinum um 3. plássið vísti Bjarni Skaalum, at hann kann spæla gott billard, tá hann vil og alspenti skjótleikin ikki tekur ræðið av honum. Hann fekk 774 eygu móti Ólavi, sum datt heilt niðurímillum í teimum seinastu dystunum. Hann fekk 350 eygu í hesum dystinum. Ólavur hevur annars víst seg at vera millum teir frægastu spælararnar, og tá tað rullar, so er tað bara út eftir Landavegnum, sum tikið verður til. Men hesaferð rullaði tað ikki nóg væl, tá ástóð. Og soleiðis er tað so oftandi í avgerandi dystum í billard – hjá teimum flestu. So tá avtornaði var munurin kanska ikki tann heilt stóri millum hesar fýra av okkara bestu spælarum.

Eftir eina spennandi kapping handaði formaðurin í Billardsambandinum, Steinbjørn í Dali steyp, sum Atlantic Airways hevur latið. Harumframt fekk føroyameistarin eina ferð frá flogfelagnum fyri tvey.



*Henrik Pedersen, nýggjur føroyameistari*



*Teir tríggir bestu í Atlantic Airways Cup í ár: Henrik Pedersen, Krisjan Sune Høgnesen og Bjarni Skaalum*



*Bjarni Skaalum náddi ikki finaluna men brillieraðir í dystinum um 3. plássið*


*Ólavur Kjølbro vísti framúr gott spæl í fleiri av dystunum. Tá tað rullaði, so var tað út eftir landavegnum, men tó ikki tá ástóð*


*Nú stendur nógv á Krisjan Suna – man Henrik fara við meistaraheitinum!*



Krisjan Sune Høgnesen mátti lúta fyri Henriki Pedersen hesaferð



*Henrik Pedersen í sínum eyðkenda stíli*

### Liðkappingin

Endaliga úrslitið av liðkappingini í ár gjørdist hetta:

**<u>1. deild:</u>** Føroyameistari Klaksvíkar Billardfelag, 104 stig og 22.32 eygu í meðal, nr. 2 Kaggin 1, 82 stig og 18.99 eygu í meðal, nr. 3 Havnar Klubbi 66 stig og 18.93 eygu í meðal, nr. 4 Tvøroyrar Klubbi 56 stig og 15,70 eygu í meðal og aftastur Kaggin 2 við 52 stigum og 15.95 eygum í meðal. Á vinnandi liðnum spældu Krisjan Sune Høgnesen, Ólavur Kjølbro og Sonhard Johannessen.

**<u>2. deild:</u>** Vinnari Klaksvíkar Billardfelag 2 við 102 stigum og 10.24 eygum í meðal, nr. 2 Klaksvíkar Billardfelag 1 við 78 stigum og 10.33 eygum í meðal, nr. 3 Havnar Klubbi við 69 stigum og 9.17 eygum í meðal, nr. 4 Kaggin við 65 stigum og 8,44 eygum í meðal og aftast Tvøroyrar Billardfelag við 10 stigum og 4.94 eygum í meðal. Á vinnandi liðnum hava verið rættiliga nógvir spælarar, eitt nú Flemming Isaksen, Óli Biskupstø, Tórður Andreassen og Ingi Isaksen.

Teir fimm bestu spælararnir í liðkappingini í ár vóru: Henrik Pedersen við 26,80 eygum í meðal, nr. 2 Krisjan Sune Høgnesen við 26,52 eygum, nr. 3 Bjarni Skaalum við 22,62 eygum, nr. 4 Ólavur Kjølbro við 22,1 eygum og nr. 5 Sonhard Johannessen við 20.39 eygum í meðal.

Billardsamband Føroya fylti 25 ár í fjør og í tí sambandi hevur verið tosað um at skipa fyri eini jubileumskapping í vár ella seinni í heyst. Meira um hetta seinni.


*Formaðurin í Billardsambandinum Steinbjørn í Dali handar føroyameistaranum fyri lið, Klaksvíkar Billardfelag steyp. Á liðnum Ólavur Kjølbro, Krisjan Sune Høgnesen og Sonhard Johannessen, sum vantar á myndini*


*Liðformaðurin í Klaksvíkar Billardfelag 2, Flemming Isaksen tekur ímóti gullinum vegna lið sítt*